# Brátt hendir okkurt spennandi í Føroyum

*Hann starvast hjá CMC Records og hann hevur júst verið í Føroyum í samband við konsertirnar hjá Creamy, sum eru undir veingjabreiði felagsins og sum hann „uppdagaði". Jens Ove Friis var í Føroyum til Prix Føroyar í fjør og hann vitjar ofta, tí hann væntar, at brátt hendir okkurt spennandi innan tónleikin í Føroyum*

DAGFINN OLSEN

Jens Ove Friis vitjar ofta í Føroyum og tað er ikki bert av teirri orsøk, at hann er giftur føroyskari konu. Hann hevur nevniliga stóran áhuga í føroyskum tónleiki, og hesin áhugi gjørdist ikki minni, tá hann í fjør var ein av útlendsku gestunum til Prix Føroyar finaluna. Eitt tiltak, sum bæði tónleikaliga, tøkniliga og sum heild, syntist honum ein framúr framleiðsla



*Fólk innan tónleikaídnaðin vænta, at okkurt brátt hendir í krókunum. Hesum er Jens Ove Friis samdur í. Mynd: Jens Kristian Vang*

**Creamy.**

Og Jens Ove Friis er ikki ein og hvør. Hann hevur júst vitjað aftur í Føroyum í samband við konsertirnar hjá Creamy.

Tað var Jens Ove Friis, sum „uppdagaði" tær báðar sanggenturnar.

- Eg havi ongantíð tikið eina so skjóta avgerð, sigur Jens Ove Friis um Creamy, sum eru undir eini deild hjá CMC, sum nevnist Recart og leggur meira dent á tað listarliga og kreativa.

Genturnar í Creamy komu sjálvar til CMC og Jens Ove gav teimum játtandi svar longu dagin eftir, at hann hevði hoyrt tær.

Hann leggur dent á, at Creamy er ikki ein gjørdur, íspunnin ella framaldur bólkur.

- Tær duga veruliga at syngja, smílist Jens Ove Friis og sipar til, at tað ikki er óvanligt í tónleikaídnaðinum í dag, at bólkar verða skaptir, framaldir, og at fyrst verður spurt, hvussu persónarnir síggja út.

**Stjørnugóðs**

Tær báðar í Creamy finna sjálvar løg og hava áður sungið í kórinum KOPP, sum hevur vitjað í Føroyum.

Jens Ove Friis er hugtikin av gentunum í Creamy og heldur tær hava rættuligt stjørnugóðs í sær.

- Tá tær skuldu heiðrast við tribble platín plátum, komu tær ov seint, tí kavi var og trupulleikar stungu seg upp við at náa fram. Tær høvdu júst leikt tvær konsertir og sóu ikki ov væl út, men tá tær sóu myndatólini og stóru linsurnar, vóru tær púra frískar, minnist Jens Ove og leggur afturat, at tær eru snilda samansetingin av innaru og uttaru styrkini og øll fáa altíð okkurt heim við, tá creamy hevur verið á palli.

Jens Ove dylir tó ikki, at góð fólk standa aftanfyri bólkin.

**Creamy á enskum**

Creamy hava selt yvir 200.000 fløgur og í Føroyum sóu og hoyrdu eini 4000 fólk genturnar. Jens Ove er væl nøgdur við konsertirnar í Føroyum og var eisini bilsin av upphitingini, ið Kular Røtur úr Klaksvík tóku sær av.

Í heyst kemur nýggj fløga við Creamy. Møguliga kemur ein ensk fløga einaferð, tí mett verður, at genturnar í Creamy eru úr altjóða stjørnutilfari.

Men dentur verður lagdur á, at verður tað ikki til meira, enn at bólkurin hevur lagt Danmark og Føroyar undir seg, so er tað eisini í lagið.

- Tað hevur týdning, at tær gera tað, ið teimum dámar. Tær eru 13 - 14 ár og fara ikki altíð at syngja barnasangir, men Creamy má ongantíð blíva eftirapan av t.d. Aqua, sigur Jens Ove Friis, sum eisini leggur dent á týdningin, sum tað hevur, at familjurnar hjá gentunum eru við á mangan hátt og stuðla sera væl.

**Brátt hendir okkurt spennandi**

At Jens Ove var við til Prix Føroyar í fjør var ein upplivíng, ið gjørdi hann bilsnan.

Norðurlandahúsið hevur sett okkurt í gongd í honum og á ferðini í Føroyum nú, hevur hann hitt ymisk fólk innan tónleik í Føroyum.

Og ivaleyst hevur hann okkurt kasettuband í jakkalummanum á ferðini til Danmarkar aftur.

Hann sigur, at hann vitjar í Føroyum av og á og roynir hann at hava eygu og oyru opin, tí hann væntar, at brátt hendir okkurt spennandi á føroyska tónleikapallinum.

- Sum eisini hevur verið frammi her í blaðnum fyrr, so er tónleikaídnaðurin við at mettast av høvuðsstreyminum innan tónleikin. Nú verða eygui vend aðrar vegir og fólk innan ídnaðin vænta, at okkurt brátt hendir í krókunum. Hesum er Jens Ove samdur í og hann væntar brátt at hoyra okkurt serstakt og serføroyskt.

Jens Ove Friis heldur, at Prix Føroyar hevur ómetaligan týdning fyri føroyskt tónleikalív. Var tað ikki, hevði hann sjálvur ongantíð fingið eina mynd av føroyskum tónleiki, men nú kann hann royna at fylgja hesum.

Hann metir, at áhugin úti í heimi er stórur fyri tilakinum Prix Føroyar og at hetta kann verða lopfjølin, men ein eigur at leggja sær í geyma, at kanska er áhugin ikki fyri nummar eitt, men kanska nummar tvey ella onkrum øðrum.

## Fundurin verður á Brandskúlanum

Herfyri skrivaðu vit, at fundur um Brandskúlan og ALV skúlan verður á ALV skúlanum 6. mars. Hetta er ikki heilt rætt, tí fundurin verður hildin á Brandskúlanum tann 6. mars klokkan 10.

Tað er Jógvan Mørkøre, bygdarráðsformaður í Hósvík, ið hevur kallað inn til fundar. Orsøkin er kjakið um ALV skúlan og Brandskúlan, hvørt báðir skulu vera á sama stað við Áir og hvør skal víkja, um talan verður um tað.

Málið tykist trupult og fløkt og tí hevur Jógvan Mørkøre kallað inn til fundin. Fundarboð eru send Yvirfriðingarnevndini, Undirvísingar- og Mentamálastýrinum, Arbeiðseftirlitinum, ALV skúlanum, Føroya Brandskúla, Umhvørvisnevndini í Sundalagnum, Almanna- og Heilsumálastýrinum og Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

Øssur av Steinum á ALV skúlanum visti hósdagin at siga blaðnum, at sera nógvur roykur framvegis merkist hjá teimum, tá Brandskúlin skipar fyri venjingum. Hann sigur, at Arbeiðseftirlitið hevur kannað málið, men at har hava tey avgjørt, at støða verður eingin tikin, fyrr enn eftir fundin tann 6. mars.

*- do -*



## Ross á pall

Leikurin „Eitt ross og annað" vendir sær til smærri børn, men er líka nógv til barnsligar sálir.

Gríma hevur leikt leikin fyri skúlum og barnagørðum í Havn, men leygardagin og sunnudagin klokkan 16 verða almennar sýningar í hølunum hjá Grímu á Meiarínum í Tórsgøtu í Havn.

Atgongumerki fáast á Kunningarstovuni í Havn ella við dyrnar.

Gríma ætlar at ferðast í Føroyum at leika fyri skúlum og barnagørðum. Eisini tey, sum ikki ganga í skúla ella dagrøkt, eru vælkomin at hyggja, tá leikurin verður spældur, har tey búgva. Tey skulu bara geva skúlunum boð ella ringja til Grímu í Havn á telefon 318617



- do -

## Hot yrkir enn

*Síðani Johan Mortensen gav út djarvt yrkingasavn í 1972, hevur verið tøgn, men nú hevur hann aftur latið savn úr hondum*

DAGFINN OLSEN

Undir navninum Hot gav tá 28 ára gamli Johan Mortensen í 1972 út yrkingasavnið Libido, sum hoyrir til tey djarvastu, sum komu út í sjeytiárunum, hvat sniði viðvíkir. Umframt orðini, hevði uppsetingin nógv at siga í savninum.

Síðani hoyrdist einki aftur frá Hot, tó at Johan hevur verið frammi sum vinnulívsmaður.

Men nú er aftur eitt yrkingasavn komið úr hondum hansara. Tað nevnist Svartur Ælabogi. Uttan at samanbera, so er eisini hesaferð talan um serstakt snið. Líkt japanskum haiku yrkingum. Stuttar og reglurnar eru fáar.

Ferðir og upplivingar uttanlanda og í Sandoynni og á Dímum merkja nýggja savnið




*Svartur ælabogi nevnist nýggja yrkingasavnið hjá Johan Mortensen*



# Ikki til verka 1. mars uttan løn

*Í samband við samráðingarnar millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið, sigur felagið m.a. í tíðindaskrivi, at Fíggjarmálastýrið hevur givið lønardeildini hjá Undirvísingar- og mentamálastýrinum boð um ikki at gjalda lønina fyri mars út til teir forútbetaltu sáttmálasettu lærararnar og at hetta er provokatión.*

Føroya Lærarafelag hevur boðað frá arbeiðssteðgi fyri allar limir sínar, sum kunnu fara í arbeiðssteðg, tvs. allar sáttmálasettar lærarar í fólkaskúlanum. Harafturat hava vit boðað frá blokadu.

Hetta er gjørt eftir reglunum í Høvuðsavtaluni millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Føroya Lærarafelag hevur hildið seg til reglurnar.

Men Fíggjarmálastýrið hevur longu 14. februar givið lønardeildini hjá Undirvísingar- og mentamálastýrinum boð um ikki at gjalda lønina fyri mars út til teir forútbetaltu sáttmálasettu lærararnar. Hóast Føroya Lærarafelag hevur mótmælt hesum, hava vit í dag fingið váttan fyri, at lønardeildin hjá UMMS ongi onnur boð hevur fingið. Tey eru í dag farin at fyrireika lønarútgjaldingarnar til lærarar í fólkaskúlanum.

Føroya Lærarafelag veit væl, at í Danmark verður lønin steðga upp undir arbeiðssteðg hjá forútløntum, men tá er tað eftir **greiðari** avtalu millum partarnar.

Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið hava onga avtalu um slíka manngongd.

Tí er hetta ein grov provokatión og brot uppá sáttmálan fyri teir sáttmálasettu lærararnar í fólkaskúlanum. Í sáttmálanum millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag stendur í § 4, stk. 4: Lønin verður goldin mánaðarliga …. og í seinasta lagi síðsta dag í mánaðnum, sum peningastovnarnir hava opið.

Hvat nú um semingsmaðurin útsetur arbeiðssteðgin eina viku?

Skal tann parturin av teimum sáttmálasettu lærarunum, sum eru forútlønt, arbeiða fyri onga løn?

Nei, tað verður av ongum!!

Nevnd Føroya Lærarafelags hevur tí samtykt, at um teir forútløntu sáttmálasettu lærararnir ikki hava lønina í seinasta lagi kl.10 týsdagin 29. Februar, fara teir undir ongum umstøðum til arbeiðis 1. mars.

Arbeiðsgevararnir tosa so søtt um spælireglar í samband við Høvusðavtalur.

Okkara roynd við Høvuðsavtaluni er, at tað er fakfelagið, sum skal halda seg til reglurnar, men arbeiðsgevarin/ Fíggjarmálastýrið kann gera, hvat tað vil.

Fíggjarmálastýrið gongur ongatíð undir nakrar spælireglar. Teir tulka reglurnar, sum tað passar teimum best.

Vit hava ikki plikt til at boða frá okkara uppskotum til semingsmenn fyrr enn týsdagin 29. februar.

Føroya Lærarafelag rennur ikki á leistum fyri Fíggjarmálastýrinum, sum støðan er nú.



**Føroya Lærarafelag**
**Elsa Birgitta P. Petersen**

# Gjalda ikki fyri nakað vit ikki fáa

*Karsten Hansen sigur í viðmerking til tíðindaskriv frá Lærarafelagnum, at boða fólk frá, at tey fara ikki til arbeiðis, so kunnu tey ikki vænta sær løn*

DAGFINN OLSEN

Karsten Hansen skilir ikki, at Føroya Lærarafelag í tíðindaskrivi tosar um brot á avtalu og at Fíggjarmálastýrið ikki heldur spælireglur. Hann vísir til, at ongar reglur, ongin avtala, er á júst hesum økinum.

- Ein kann ikki bróta reglur, sum ikki eru til, sigur Karsten Hansen.

**Feløgini gjalda**

- Vit kunnu ikki gjalda fyri nakað, vit ikki fáa, tí hetta snýr seg um skattakrónur. Fólk sum boða frá, at tey ikki fara til arbeiðis, kunnu ikki fáa løn, heldur Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri.

Hann metir ikki, at nakað løgið er í, at Fíggjarmálastýrið longu 14. februar gevur lønardeildini í UMMS boð, tí lærarar boðaðu longu í summar frá ætlanum um arbeiðssteðg.



*Fólk sum boða frá, at tey ikki fara til arbeiðis, kunnu ikki fáa løn, heldur Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri*

Í samaband við tíðarfreistina fyri lønarútgjaldíng, sum Lærarafelagið setir til týsdagin 29. februar klokkan 10, sigur Karsten Hansen, at hetta er teirra val.

- Men vanlig siðvenja er, at feløgini gjalda limum løn undir verkfalli, um tey hava pening til tess, men um tey gera tað, er ikki okkara borð, sigur Karsten Hansen.

**Fáa fyri eina viku**

Lærarafelagið spyr hvat hendir, um semingsmenn útseta arbeiðssteðgin eina viku.

- Ja, vísir tað seg, at so er, so fáa fólk løn fyri ta vikuna, tey eru til arbeiðis, sigur Karsten Hansen.

Men í samband við prátið um avtalur og reglur og brot á hesar, staðfestir Karsten Hansen, at honum vitandi er eingin avtala við Lærarafelagið um hetta og at í Føroyum hava ongantíð verið reglur um, at fólk sum ikki fara til arbeiðis, fáa løn.


## LEIÐARASKEIÐ

### Grundskeið í leiðslu I

**Endamál**
Endamálið við skeiðinum er:
- At fáa innlit í og fatan av avgerðandi teoretiskum fyritreytum fyri útinning av leiðslu og samspæli við onnur
- At fáa førleika í at brúka hóskandi mannagongd, tá ið felags uppgávur skulu loysast

**Arbeiðsháttur**
Skeiðið er lagt soleiðis tilrættis, at luttakararnir fáa møguleika fyri at royna seg við ymsum framferðarhættum, at uppliva, hvørja ávirkan teir hava á onnur, at viðgera egnar upplivingar og læra av tí.

**Stevnumið**
Eftir skeiðið hava luttakararnir fingið innlit í:
- Fyritreytir fyri effektivum samskifti og samstarvi
- Hvussu samskiftis- og samstarvstrupulleikar verða loystir
- Endamál, skipan, stýring, og menning, tá ið ein uppgáva skal loysast í bólki
- Hvussu bólkaarbeiði og persónligt feedback verða eygleidd
- Funktiónstreytir og arbeiðsumstøður
- Hugburð leiðslunnar og hvørjar avleiðingar, hann kann hava, leiklut leiðarans og rollupsøl, og leiðslu í eini støðu, ið er givin frammanundan

**Innihald**
- Samskiftishættir (at lurta aktivt)
- Leiðaraleiklutir, teirra millum, leiklutirnir sum serfrøðingur og sum leiðari
- Motivatiónsteoriir við støði í Herzberg
- Leiðarafunktiónir
- Hvussu trupulleikar verða viðgjørdir
- Praktiskar venjingar í skipan og útinning av arbeiði
- Útinning av kontrollfunktiónum hjá leiðarum

***Tíð***
*Hósdagin ....27. apríl kl. 09.00 til leygardagin 29. apríl kl. 16.15*

***Staður***
*Hotel Eiði. Skeiðið er eitt internetskeið*

***Skeiðleiðarar***
*Peter Gram og Gloria Kalsø frá LMB*

***Prísur***
*Kr. 6.000,00 fyri hvønn, íroknað mat og gisting*

***Tilmeldingarfreist***
*13. apríl 2000*

## LEIÐARASKEIÐ

### Leiðsluframferð

**Endamál**
- Tú fært vitan um og innlit í at brúka tíni evni og førleika í bólkum við felagsábyrgd fyri úrdrátti, mannagongd og arbeiðshátti
- Harafturat fært tú vitan um hættir, ið vísa á førleikar hjá tær sjálvum og øðrum við atliti at skapa grundarlag fyri framtíðar avgerðum.

**Grundhugsan**
Skeiðið tekur støðu í hesi hugsan: Leiðarar og starvsfólk fáa í størri mun ábyrgdina av í felag at seta mál, skipa, stýra og menna loysnina av eini uppgávu í felagsskapinum.

**Innihald**
Tað verður arbeitt út frá gerandisdegi luttakaranna við:
- Stovnan, umsiting og endurnýggjan av felags viðurskiftum.
- Skipan av loysnum av uppgávum.
- Eygleiðing av arbeiðshættum og feedback mannagongd.
- Samrøður í starvsfólkamenning og við atliti at menna evni og førleika hjá tær sjálvum og øðrum.
- Innan- og uttanhýsis sambond.
- Framferðarmotiv.
- Framferðarrák.
- Viðgerð av tvístøðum.
- Avhendan.
- Leiðslu út frá givnari støðu.
- Serkunnleika og leiðslu.

***Tíð***
*Hósdagin ....23. mars kl. 09.00 til leygardagin 25. mars kl. 16.15*

***Staður***
*Hotel Vágar. Skeiðið er eitt vistarskeið*

***Skeiðleiðarar***
*Jørgen Andersen, Poul Rasmussen og Peter Gram frá LMB*

***Prísur***
*Kr. 7.500,00 fyri hvønn, íroknað mat og gisting*

***Tilmeldingarfreist***
*03. mars 2000*

*Skeiðini eru ætlað leiðarum, millumleiðarum og komandi leiðarum. Fleiri upplýsingar og tilmeldingarblað fáast við at venda sær til:*

**LEIÐSLUMENNINGARBÓLKURIN**
**SKEIÐTÆNASTA HANDILSSKÚLANS**

STH★LMB

Marknagilsvegur 77 • Postsmoga 177 • 110 Tórshavn • Tel 317177 • Fax 313374

*LMB (Leiðslumenningarbólkurin) er ein arbeiðsbólkur, ið er samansettur av Føroya Handilsskúla, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Føroya Ídnaðarfelag og Menningarstovuni við tí endamáli at eggja til sjónir, manna leiðslur og skipa fyri skeiðum. Skeiðrøðin várið 2000 fevnir um hesi skeið: Grundskeið í leiðslu - Leiðslumenning og læra at loysa trupulleikar - Leiðsluframferð.*